# Vóni fleiri oljufeløg vera við

**Nú uppskot til eitt nýtt útbjóðingarumfar er lagt fyri tingið sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður seg vóna, at fleiri av oljufeløgunum fara at vera við. Túrurin í Norðurnoregi í farnu viku hevur sannført landsstýrismannin, at eitt felag sum Statoil fer at vera við í nýggja útbjóðing**

2. RUNDA
*Jan Müller*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum, royndi eitt sindur av hvørjum, tá hann vitjaði í Hammerfest í Norðurnoregi í farnu viku. Her er hann saman við oljufólki til døgurða við reinsdjórakjøti frá samum*

Uppskotið til 2. útbjóðingarumfar á føroyska landgrunninum fór niðan í tingið í farnu viku. Og verður helst til viðgerar eftir páskir. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður sigur, at tað minnir nógv um tað fyrsta uppskotið við undantaki av, at ein størri vídd verður boðin út nú enn tá, og tað verður eisini boðið út í ein útsynning úr Føroyum.

Nú bretar eru í ferð við at bjóða út av nýggjum, har teir linka treytirnar fyri at fasthalda áhugan fyri økinum spurdu vit landsstýrismannin, um tað er rætt av okkum at varðveita treytirnar frá fyrstu rundu til hesa næstu?

Hann staðfestir, at uppskotið í stóran mun hevur somu treytir sum tað gamla. – Tað hevur verið tosað aftur og fram um, hvørt man skuldi linka treytirnar, men vitandi um tann áhuga, sum er, so hevur man hildið, at man kundi halda fast við tær upprunaligu treytirnar. Tí tað hevur ikki víst seg, at tær hava hildið feløgunum aftur at koma higar. Við undantaki av at upphæddin til at fáá útbjóðingartilfarið er lækkað nakað, so eru hinar treytirnar tær somu.

Bjarni Djurholm sigur annars, at tað at vit fara undir eitt nýtt útbjóðingarumfar eigur eisini í Føroyum at geva okkum eina ávísa vón um, at tað kanska fer at ganga betur hesaferð enn seinast. -Tað tykist fyri mær sum at tað er áhugi fyri tí føroyska landgrunninum og er tað soleiðis, at feløgni raka við nakað eystan fyri markið í summar, so verður tað veruliga spennandi í Føroyum. Latið okkum tí halda fast við tað vit hava bygt upp og vóna, at tað spyrst okkurt positivt burtur úr, tá tað verður greitt, hvør kemur at bjóða uppá føroyska landgrunnin um ársskiftið.

Landsstýrismaðurin fegnast annars um, at fólkini í Oljufyrisitingini síggja hetta sum eitt framhald av tí arbeiði, sum er gjørt higartil og halda fast við sína ekspertisu.



*Frá undirskrivingini av sáttmálanum millum Atlantsflog og norska felagið Aker Stord*

Bjarni Djurholm vónar, at fleiri av teimum stóru oljufeløgunum, fara at vera við í 2. útbjóðing. Okkurt er kanska meira ivasamt í løtuni, meðan onnur ætla sær at satsa uppá føroyaøkið, og tað er sera positivt.

Júst heimafturkomin av ferð í Norðurnorra, har m.a. stóra norska oljufelagið Statoil var vertur, kennir landsstýrismaðurin í oljumálum seg sannførdan um, at Statoil fer at vera eitt av teimum feløgunum, sum verður við í 2. útbjóðing við Føroyar, og tað fegnast hann um. – Felagið arbeiðir í økjum, sum líkjast tí føroyska, so tá hugsað verður um at raðfesta umhvørvi og trygd, man felagið teljast millum tey frægu.

# Rætt at troyta aðrar marknaðir

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur góðar vónir um, at føroyskt vinnulív megnar at fáa sáttmálar í útlandinum av sama slag sum Atlantsflog hevur fingið í Norra. Henda fyrsta ferð hansara sum nýklæktur oljumálaráðharri gav honum góða ballast at arbeiða víðari á økinum**

OLJUFERÐ
*Jan Müller*

– Hesin túrurin hevur verið stak positivur. Fyri tað fyrsta hava vit staðfest, at Atlantsflog megnar at gera avtalur úti í heimi, og kann man gera avtalur við norðmenn, so kann man koma langt. Norðmenn eru ikki altíð lættir at gera avtalur við, tí teir av summum verða mettir at vera nokk so protektiónistiskir. Tá Atlantsflog so hevur megnað hetta, trúgvi eg eisini, at felagið kann koma nógv longur. So tað í sjálvum sær er eitt stórt stig.

Landsstýrismaðurin heldur eisini,at tað er rætti veguriun at ganga, tá Atlantsflog roynir at troyta aðrar marknaðir. Flogferðsla er ein trupul vinna og tess fleiri bein Atlantsflog fær at standa á, tess betur er tað fyri felagið og fyri eigara, landsstýrið og harvið eisini fyri landskassan.

Bjarni Djurholm heldur somuleiðis, at tað er ein náttúrlig kombinatión at vera á slíkum túri umboðandi bæði oljuvinnu og flogferðslu. Tað snýr seg í síðsta enda um vinnu. Tekur man so Atlantsflog, so er tað við at blíva til ein inngróvnan part av eini møguligari oljuvinnu í Føroyum. Tvs. at Atlantsflog onkursvegna verður ein spegilsmynd av virksemi, sum møguliga fer at koma og tann, sum slóðar fyri, at aðrar vinnur í Føroyum hava møguleika at bjóða seg fram.

- Eg haldi ikki, at føroyskar vinnur skulu luttaka í oljuvinnu bara tí tær eru føroyskar. Tær skulu luttaka, tí tær eru dugnaligar. Og har haldi eg, at Atlantsflog hevur prógvað, at tað ber til og at við míðvísum arbeiði kann man koma rættiliga langt. So tá føroyska vinnulívið skal luttaka í oljuvirksemi, so skal tað vera tí, at tað hevur nakað at bjóða fram.



*Risastóru gasstangarnir á oynni Melkøya út fyri Hammerfest, sum skulu goyma gass úr Barentshavinum*

Bjarni Djurholm sigur, at ferðin í Hammerfest, har vitjað varð á oynni Melkøya, var heilt ótrúlig. Tað er eitt so ófatiliga stórt anlegg, sum har verður sett upp har, at tú hevur ilt við at ímynda sær, at tú kanst brúka 45 mill. kr. uppá eina verkætlan og at hon samtíðis kann vera lønandi.

- Eg haldi eg sjálvur havi fingið eina góða ballast á hesum túrinum. Samanlagt hevur hesin túrurin verið eitt stórt upplivilsi.

ítróttur

Nr. 68 • mikudagur • 7. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gullvenjararnir halda fram í Kyndli



*Kári Nielsen fer saman við Birgir Hansen at halda fram sum venjarar hjá føroyameistarunum úr Kyndli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Teir báðir Kári Nielsen og Birgir Hansen, sum seinastu vikurnar hava leitt besta mansliðið hjá Kyndli til meistaraheitið, halda fram sum venjarar hjá havnarfelagnum komandi ár**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tey flestu hondbóltsfeløgini kring landið arbeiða í hesum døgum av fullari megi við at útvega venjarar til komandi kappingarár. Á ársveitsluni hjá føroyameistarunum úr Kyndli leygarkvøldið avdúkaði formaðurin í felagnum, Jóannes Dalsgarð, at teir báðir, Kári Nielsen og Birgir Hansen, halda fram sum venjarar komandi ár.

## Fegnir leikarar

Kári Nielsen og Birgir Hansen tóku við sum venjarar hjá besta mansliðnum hjá Kyndli seint í júst farna kappingarári, tá ið danin, Jan Djurhuus, og Kyndil í felag avgjørdu at steðga samstarvið sínamillum. Tað er eingin loyna, at leikararnir í felagnum hava verið stak væl nøgdir við Kára og Birgir, og fagnaðurin millum leikararnar var stórur, tá ið Jóannes Dalsgarð bar tíðindini á ársveitsluni.

Formaðurin í Kyndli sigur, at leiðslan í felagnum hevur verið sera væl nøgd við tað arbeiði, ið Kári og Birgir hava gjørt, og tá ið so eisini leikararnir dámdu væl teir báðar, var leiðslan sannførd um, at teir báðir vóru ovast á ynskilistanum yvir venjarar til komandi ár. Somuleiðis sigur Jóannes Dalsgarð, at tað eisini hevur týdning, at talan er um tveir mans, ið hava sínar røtur í felagnum, og sum tískil hava tann rætta felagsandan.

## Umhugsa europeiskan hondbólt

Sum skilst á formanninum í Kyndli er ikki væntandi, at nøkur serlig frágongd verður úr hópinum hjá føroyameistarunum til komandi kappingarár. Jóannes Dalsgarð sigur eisini, at heldur verður talan um, at liðið verður styrkt á onkrum plássi. Kyndil hevur gott fólk, og somuleiðis eru nógvir ungir og evnaríkir leikarar á veg upp í vaksnamannadeildina, og vit skulu byggja liðið á okkara egna fólk, sigur Jóannes Dalsgarð, men leggur afturtat, at tað ikki merkir, at liðið hevur tørv á styrki uttanífrá.

Spurningurin um europeiskan hondbólt hevur eisini verið umrøddur í leiðsluni í havnarfelagnum, men enn er nøkur støða ikki tikin til hetta mál. Formaðurin í Kyndli sigur, at spurningurin er, hvussu nógv man fær burturúr at fara til ein europeiskan dyst og kanska blíva avsmurdur, heldur enn at fara til onkra aðra kapping við fleiri javnari dystum fyri sama pening. Europeiskur hondbóltur er ein stórur fíggjarligur spurningur, og tað noyðast vit at hava í huganum, sigur Jóannes Dalsgarð.

## Kvinnurnar skulu styrkjast

Kvinnuliðið hjá Kyndli hevur havt eitt serstakliga vánaligt ár í ár, og hetta er nakað, ið skal broytast til komandi ár. Kyndil hevur sett roynda venjaran, Geir Wardum, til at taka sær av besta kvinnuliðnum komandi kappingarár, og hann hevur longu lagt fram síni ynskir um styrk til komandi kappingarár. Geir Wardum sigur, at hann kundi tonkt sær, at Kyndil fekk ein málmann afturat, ið var á jøvnum støði við núverandi málmannin, Fríðu Petersen, ið hevur verið besti leikarin hjá Kyndli í ár. Harafturat hevur Geir ynskt ein høgra bakk, ein spælskipara og ein strikuspælara. Leitað verður eftir hesum spælarum bæði uttanlands og her heima, sigur Geir, men leggur afturat, at tað er ikki vist, at liðið fær allar hesar styrkir, tí tað er eisini ein spurningur um pengar og onnur viðurskiftir.

Jóannes Dalsgarð, formaður í Kyndil, váttar fyri Sosialinum, at arbeitt verður við at styrkja munandi um kvinnuliðið hjá Kyndil, men enn er einki fingið upp á pláss.

## Stórar ætlanir fyri 2006

Um tvey ár fyllir Kyndil 50 ár, og tá ætlar felagið sær at verða við heilt frammi í oddinum, bæði hjá monnum og kvinnum. Jóannes Dalsgarð sigur, at tey hava nakrar visiónir fyri framtíðina, sum hann heldur sær bjarta út, tí úrslitini hjá ungdómsdeildunum hava verið sera góð, serstakliga á dreingjasíðuni. Hann leggur tó afturat, at alt hetta hevði als ikki borið til, um felagið ikki hevði so góðar stuðlar, venjarar og onnur, ið hava tikið lut í felagsarbeiðinum, og tað er leiðslan í Kyndil ógvuliga takksom fyri.

# Ian tímir ikki meir

**Miðvallarin er givin í Vejle, har teir ikki vóru sinnaðir at veita honum nakra sum helst samsýning. Nú er Ian Højgaard opin fyri øllum nýggjum avbjóðingum**

ÚTISETI GIVIN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Ian Højgaard spælir ikki longur fótbólt í Vejle. Hann roknar við at halda fram at spæla, men í hvørjum felag tað verður, og í hvørjum landi tað verður, veit hann ikki at siga.

Orsøkin, at Ian Højgaard er givin í Vejle, er tann, at felagið ikki hevur verið sinnað at veita honum nakra samsýning fyri at spæla.

– Hesar seinastu vikurnar havi eg í tveimum dystum verið við á besta liðnum. Eg havi verið tann einasti á besta liðnum, sum onga sum helst samsýning hevur fingið fyri at spæla. Fyrst í hesum árinum tosaðu felagið og eg um, hvussu tað skuldi vera við samsýning. Tá vóru teir sinnaðir at bíða eitt sindur. Teir søgdu seg vilja útseta avgerðina til í seinasta lagið hálvan mai. Men eg tími ikki at bíða so leingi. Eg brúki meiri tíð upp á fótbóltin her, enn eg nýtti í Føroyum, og eg haldi ikki, at eg kann bjóða familjuni hetta, sigur Ian Højgaard úr Vejle, har hann eisini hevur sítt dagliga starv.

Í Vejle venja teir fýra kvøld um vikuna, umframt at teir venja leygardag fyrrapart, tá ið teir spæla sunnudag. Vejle liggur illa fyri í næstbestu deildini, og sambært Iani Højgaard er lagið í felagnum einki serligt.

## Opin fyri øllum

Ian Højgaard hevur framvegis góðan hug at spæla fótbólt. Men hann sigur seg ikki vita, hvar tað verður.

– Síðani eg boðaði frá, at eg ikki vildi halda fram í Vejle undir teimum treytum, sum eg higartil havi spælt, hevur okkurt felag sett seg í sambandi við meg. Tað eru feløg á lægri støði, men eg havi onga avgerð tikið.

*Hugsar tú um at koma aftur til Føroya at spæla fótbólt?*

– Tað er eisini ein møguleiki. Men tann møguleikin krevur eyka umhugsni, tí konan er fyri stuttum farin undir útbúgving í Danmark. Hóast hon er donsk, so leingist henni aftur til Føroya. Um eg fekk møguleikan at spæla í Føroyum, so er spurningurin, hvussu viðurskiftini annars kundu verið løgd til rættis, sigur Ian Højgaard.

Undanfarnu fimm árini hevur 28 ára gamli miðvallarin verið fastur maður á NSÍ liðnum.